UTTAN ÚR HEIMI

# Iran fingið 30 daga freist

**Iran skal gevast við sínum kjarnorkuvirksemi innan ein mánað, men Russland og Kina eru ímóti at brúka hermegi fyri at noyða landið at akta boðini**

IRAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eftir drúgvar samráðingar hevur trygdarráðið hjá ST samtykt at áleggja Iran at steðga sínum kjarnorkuvirksemi innan 30 dagar. Samtyktin er ein neyðsemja. USA og Bretland vóru fyri at hótta Iran við revsitiltøkum, men tá Russland og Kina ikki vildu taka undir við tí, samdust londini um eina neyðloysn.

Iranska stjórnin svaraði alt fyri eitt, at hon fer ikki at slaka fyri trýsti frá ST ella øðrum, og at landið fer at halda fram við kjarnorkuverkætlanini. Samstundis endurtók stjórnin í Teheran, at kjarnorkan skal einans nýtast til at nøkta tann stóra orkutørvin í landinum, og at Iran hevur ongar ætlanir um at útvega sær kjarnorkuvápn.

Amerikanska stjórnin hevur fleiri ferðir hótt við at brúka hermegi fyri at noyða Iran at slaka, men russiski uttanríkisráðharrin, Sergei Lavrov, segði í gjár, at hvørki Russland ella Kina fara at góðtaka eina slíka loysn.

Russiska stjórnin hevur roynt at fáa Iran at góðtaka, at Russland skal ríka uran fyri iranar, men hóast USA var sinnað at góðtaka eina slíka loysn, vildi Iran ikki taka av. Iranski stjórnartalsmaðurin segði í gjár, at iranar vilja sleppa at ríka uranið sjálvir, tí einki land kann dúva uppá, at ein so týðandi partur av kjarnorkuni skal koma uttaneftir.

Í morgun hittust uttanríkisráðharrarnir úr Týsklandi, Fraklandi, Bretlandi og USA í Berlin, har teir skuldu viðgera støðuna saman við uttanríkispolitiska samskiparanum hjá ES, Javier Solana, og leiðaranum á altjóða kjarnorkueftirlitinum, Mohammed ElBaradei.



*Týski samveldiskanslarin, Angela Merkel, og stjórin í altjóða kjarnorkueftirlitinum, Mohammed ElBaradei, tosa um Iran undan fundinum í Berlin í morgun*

*Mynd: Reuters*

## Av sjónum í oyðimørkina

50 norðmenn, sum hava arbeitt á oljupallum á norska landgrunninum í fleiri ár, arbeiða nú undir heilt øðrum umstøðum. Teir hava gjørt av at taka av einum tilboði um at arbeiða í oljuvinnuni í algerisku oyðimørkini.

Oljumenninir siga við Aftenposten, at tað er munur á arbeiðsviðurskiftum. Í oyðimørkini liggur hitin oman fyri 50 stig um summarið, og um kvøldið fer hann neyvan niður um 30 stig. Hinvegin eru teir ikki slopnir undan vindinum, men ístaðin fyri regn og kavarok hava teir nú sandstormarnar at stríðast við. Teir kunnu gera líka nógv um seg sum stormarnar í Norðsjónum, og tí hendir tað av og á, at heimferðin má útsetast orsakað av sandstormi.

Teir 50 menninir arbeiða hjá Statoil, og teir dylja ikki fyri, at tað er fyri ein stóran part lønin, sum hevur fingið teir at fara til Afrika, tí har fáa teir tvær ferðir so nógv burturúr.

Statoil hevur gjørt stórar íløgur í Algeria saman við bretska BP og algeriska oljufelagnum Sonatrach.

## Kann enda í fongsli

Myndugleikarnir í Hvítarusslandi kunngjørdu í gjárkvøldið, at teir hava gjørt av at ákæra andstøðupolitikaran Alexander Kozulin fyri tað, teir kalla beistagerðir. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í seks ára fongsul.

Alexander Kozulin varð handtikin í høvuðsstaðnum Minsk í síðstu viku, tá hann mótmælti úrslitinum av forsetavalinum. Ein annar andstøðupolitikari, Alexander Milinkevitch, bleiv eisini tikin, men hann er ákærdur eftir einari linari lógargrein og kann fáa 15 daga fongsul, skrivar AP.

Andstøðan í Hvítarusslandi vil ikki viðurkenna úrslitið av forsetavalinum. ES og USA hava eisini mótmælt valinum og hava gjørt av at seta ymisk tiltøk í verk ímóti 47 leiðarum í stýrinum hjá Aleksander Lukasjenko, forseta.

## Avbyrging má halda uppat

Forsetin í Egyptalandi, Hosni Mubarak, vil hava ísraelsku myndugleikarnar at gevast við at avbyrgja tey palestinsku økini Gaza og Vestara Áarbakka.

Í samrøðu við vikublaðið Al-Mussawar sigur Mubarak, at Ísrael fær einki burtur úr við at nýta harðskap ímóti palestinum, tí treytin fyri friði er, at partarnir virða hvør annan, sigur hann. Sjálvur ætlar hann sær at seta seg í samband við ta næstu ísraelsku stjórnina, so skjótt hon er skipað, og tá fer hann at mæla Ísrael til at taka friðarsamráðingarnar uppaftur beinanvegin.

– Tann palestinska Hamas-stjórnin má eisini gera sítt. Eitt nú skal hon viðurkenna allar avtalur, sum higartil eru gjørdar við Ísrael, men eg haldi, at vit mugu geva stjórnini stundir til at fáa fótin fyri seg fyrst, sigur egyptiski forsetin.

## Valdi skeivan flogvøll

Ein flogskipari hjá flogfelagnum Ryanair var so óheppin at seta flogfar sítt á skeivan flogvøll í gjár.

Flogfarið var á veg úr Liverpool til Londonderry í Norðurírlandi við 39 ferðafólkum, men ístaðin fyri at lenda á Derry-flogvøllinum valdi flogskiparin at seta flogfarið á ein hernaðarflogvøll í Ballykelly fimm kilometrar longri vesturi.

Ein talsmaður hjá Ryanair segði í gjár, at eftirlitstornið á Derry-flogvøllinum gav flogskiparanum lendingarloyvi, men at flogskiparin helt hernaðarflogvøllin vera Derry-flogvøllin. Nú skal málið kannast.

## Byggja heimsins hægstu hús

**Í tí oljuríka Dubai eru menn í ferð við at byggja eini hús, sum verða umleið 800 metrar høg**

BYGGING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir ovurríku emirarnir í Dubai skulu brúka einar 300.000 rúmmetrar av betong til húsini, sum hava fingið navnið Burj Dubai. Meiri enn 2.000 handverkarar og arbeiðsmenn byggja húsini, og sum er hækka tey eina hædd um dagin. Í gjár vóru teir komnir upp á 37. hædd.

Men enn er langt á mál, tí emirarnir hava gjørt av, at Burj Dubai skal vera heimsins hægsti bygningur. Sambært tekningunum verður hann umleið 800 metrar høgur og tískil einar 300 metrar hægri enn Taipei 101 í Taiwan, sum eigur metið í løtuni.

Men tað verður ikki tann vanligi Dubai-búgvin, sum fer at hava sína dagligu gongd í Burj Dubai. Í bygninginum verða 152 marglætisíbúðir og eitt gistingarhús, sum einki annað í heiminum kann máta seg við. Harumframt verða fleiri handlar og ymisk venjingar- og frítíðartilboð.

Burj Dubai er bara ein partur av einari størri byggiætlan, tí rundan um bygningin ætla emirarnir at byggja 30.000 íbúðir, sum

## 10.000 flutt burtur undan regni

Myndugleikarnir í Kekkia hava flutt umleið 10.000 fólk burtur úr býnum Znojmo nærhendis eysturríkska markinum, tí teir bera ótta fyri, at áhaldandi regn fer at elva til vatnflóð.

Tað hevur regnað illa nógvastaðni í Kekkia teir seinastu dagarnar, og tá kavin í fjøllunum samstundis er farin at bráðna, eru áirnar vaksnar so nógv, at myndugleikarnir hava ávarað fólk ímóti vatnflóð.

Eisini í høvuðsstaðnum Prag stúra tey fyri vatnflóð, og í gjár fóru bjargingarlið undir at leggja sandsekkir fram við tjóðatleikhúsinum og øðrum søguligum bygningum. Tey hava ikki gloymt vatnflóðina í 2002, sum legði stórar partar av tí søguliga býnum undir.



Altíð tað nýggjasta
www.sosialurin.fo